Nr. 120/2019

Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um virði av kvotum latin til reiðarí í nýggju sjófeingislógini, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu stórt er metta árliga avreiðingarvirðið (bygt á miðal avreiðingarvirði 2015-2019) av teimum 20.000 tonsunum av norðhavssild, sum tey fýra størstu reiðaríini fingu sum eginkvotu afturat við broytingini í sjófeingislógini 1. januar 2020?
2. Hvussu stórt er metta árliga avreiðingarvirði av teimum tonsum av norðhavssild, sum tey reiðarí, ið keyptu 3 og 8 ára rættindi í 2018 og 2019, fáa afturat við lógarbroytingini, ið er skotin upp í tingmáli 142/2019?
3. Hvør er sakliga og fyrisitingarliga grundgevingin fyri, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skotið upp hesar báðar lógarbroytingar?
4. Hvussu nógv hevði uppboðssølan givið landskassanum av ávikavist uppsjóvarfiski og botnfiski í Barentshavinum í 2020, um lógin ikki varð broytt, og um miðalprísurin varð tann sami sum í 2019?
5. Hvussu nógva kvotu í tonsum hava tey einstøku reiðaríini av botnfiski í Barentshavinum við nýggju lógini í 2020 – og hvussu stórt er avreiðingarvirði við miðalprísum frá 2015-2019.
6. Hvussu stóra kvotu í tonsum og virði høvdu hesi somu reiðarí í Barentshavinum í 2005?
7. Hvussu stóra kvotu av botnfiski í Barentshavinum hava tey skip, ið hava mest í ávikavist Noregi og Russlandi í 2020?
8. Hvussu nógva kvotu hava tey fýra størstu reiðaríini av makreli, norðhavssild og svartkjafti (harundir feløg, ið tey eiga part av) í 2020, og hvat er avreiðingarvirði av hesum við miðalprísum frá 2015-2019).
9. Hvussu stóra kvotu av somu fiskasløgum høvdu hesi fýra størsu reiðaríini í 2009?
10. Hvussu stóra kvotu hava tey størstu reiðaríini árliga í ávikavist Noregi og Íslandi av somu fiskasløgum í 2020?
11. Hvussu nógv avreiðingarvirði hevur útróðrarflotin (bólkur 4 a og b og bólkur 5 a og b) fingið av uppsjóvarfiski frá 2009-2019?

Viðmerkingar:
Við broytingum í sjófeingislógini eru stór virði latin til størstu reiðaríini.
Til tess bert at fáa eina hóming av summum av broytingunum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 23. juni 2020

Høgni Hoydal